Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Jákupi Hermansen á Fossinum

## til minnis



Umleið tjúgu favnar niðan frá bakkanum oman fyri Leynará, har hon fer í hin máttmikla fossin, ið fellur niður í Leynarósa, stendur húsið ið kalla verður á Fossinum. Hetta hús er barnaheimið hjá brøðrunum, Jákupi og Jógvan á Fossinum. Á hesum vakra staði og leiðum aldust teir upp til manns sum góðir brøður og felagar, og har hava teir havt sín bústað og liva saman við mammuni, Mariu á Fossinum, sum nú er 91 ára gomul, til týsdagin hin 16. september tá ein høpisleys vannlukka kom at kosta Jákup á Fossinum lívið.

Ikki er tað fáar ferðir at henda søkn hevur staðið lamsligin av slíkum meiningsleysum feigdarboðum, í hesum føri var talan um ein hin best kenda mann her um leiðir, sum vegna sítt starv hjá kommununi var at síggja og staddur har tað almenna hevði sínar ymisku uppgávir at takast við, og tað var rímiligt nakað ið røkk so víða, sum fólk búði innan Kvívíkar kommunu.

Tað búði magn og menska fyri aftan hansara friðsomu og sáttligu medferð, og komst tú á tal við hann, vart tú varður við at tú stóð yvir fyri einum manni ið ongan háva gjørdi úr sær sjálvun, lítilátin og hóvligur í allari sínari meðferð, men aftan fyri tolna og seigliga lyndi sást tú inn í eini góðlynt og blíð eygu, sum boðaðu frá einum hvørjum lívsjáttandi hugsunarhátti ið bar brá av tí skemtingarsama í lívinum, og tað var ikki lítið av hugnaligum og stuttligum lokalum søgum, sum hann kundi draga upp úr sínum breiða brøsti, tá annars umstøðurnar vóru til tað, men missfata eingin hettar; tí fyri aftan alt hetta kendi hann markið millum skemt og álvara, Jákup var nevnliga ein skjótt fatandi og gløggur hugsari, sum fangaði tað tú ætlaði at siga, áðrenn søgan var hálvsøgd.

Eg hugsi vit eiga fáar av hansara "kaliber", man tað ikki vera so; at vit áttu bert ein Jákup á Fossinum, og hann høvdu Leynarbygd og okkara fámenta søkn ikki ráð at missa.

Tá eg minnist aftur á brøðurnar báðar, sum oftast vóru nær hvørjum øðrum í arbeiði ella øðrum viðurskiftum, var tað ikki sørt hetjukent yvir tí mynd, tú fangaði av teimun og teirra høvisku medferð.

Í ræntuliga mong av sínum bestu árðum sigldu teir við norskum bátum, til teir nú tey fylgjandi mongu árini hava arbeitt uppi á landi.

Hvat teir í togan og tøkum hava lagt rygg og lendar til við tí ókendu megi teir áttu, er hettar ikki rætta stað at røða um, men hetta var teimun givið í vøggugávu, og hana gróvu teir ikki niður.

Tað hava sanniliga áður herja hvassir vindar á húsini á Fossinum. Triðja páskamorgun í 1953 fóru fýra manns til útróðrar úr hesum húsi, tá kvøldið kom var greitt, at eingin teirra kom at seta fótin aftur á land. Hesir vóru pápin, John, og bróðurin, Hildibjartur, fosturbróðurin, Jeffrie, og pápabeiggin Anthon, sostatt komu Jákup og Jógvan at verða faðirleysir bert 7 og 8 ára gamlir, tey vóru annars 6 systkin og elst av teimun var Hildibjartur, sum var 18 ára gamal og var við hendan feigdartúr.

*Um deyðan vist eg sanni*
*hann líknar tykist mær,*
*tí reysta sløttumanni*
*sum heystardagin slær*
*alt lív á heimsins vegi*
*ber sama endamál.*
*Sum blóman best í megi*
*ið fall um nýhvest stál*

Úr Ísl.

Skal nøkur meining finnast í tí meiningsleysa, so røkkur mannahugsan ikki til, og teir ósvaraðu gátuføru spurningarnir økjast og hópa seg upp, tess longur tú kemur fram eftir lívsins breyt.

Men eitt stað fyri framman klárar upp, og deyðans ístoka sum nú rekur við sínum kalda támi og hylir alt og øll, skal einaferð víkja fyri ljósinum av skýfríum himmni og Leynarbygd skal aftur liggja í varma av lívsins æviga sólarhita, sum júst er sjálvt lívið.

Hin stóra áin sum Jákup kendi lagið og sjóið frá, og óiva hevur hann frá barni av ligið og lurta eftir hennara skiftandi kvæði og løgum, stundum ógvusligt dun og dynjan tá hon við fullari fylling og mátti fór morreyð eftir bakkunum, og aðrar tíðir tá hon mjúk og smidlig kíndi hellir og klettar á sínum niðurbrýndu farleiðum bert eina leið oman, út av fossinum og niður í Leynarósa.

Nú hevur Jákup tikið leiðina eftir øðrum fossi - hann er farin um hann og lendur á hvítari sandstrond, har øll dynjan og dun eru tagna, hann er sessaður millum sítt undanfarna fólk, stigin inn um gáttina í teim ævigu bústøðun inn í várt rætta og sanna fedranna heim.

*Eg farin eri langt til ferða*
*og fedrar mínar hitta skal*
*Har sál mín alla tíð skal verða*
*eg sigi verð og fold farvæl*
*Vár Drottur tak tú mína ond*
*og míni kæru verj tín hond*

Uppi í Trøð 18. sept. 2003
**Viggo Johannesen**



*Húsini hjá Jákupi (t.v.) og barnaheimið á Fossinum í Leynum*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Nýggjur leiðari á Ellis- og Umlættingarheiminum í Havn

Frá 1. november 2003 er Ida Sørensen í Havn sett sum leiðari av Ellis- og Umlættingarheiminum í V.U. Hammersheimbsgøtu í Havn.

Ida er 49 ára gomul, hon bleiv útbúgvin sum sjúkrasystir á Føroya Sjúkrasystraskúla í 1979 og arbeiddi í nøkur á sum sjúkrasystir á Landssjúkrahúsinum.

Í 1986-87 gekk hon á Danmarks Sygepleje Højskole, har hon tók útbúgving innan frálæru. Hon var lærari á Føroya Sjúkrasystraskúla frá 1985-1997, har hon var fyristøðukvinna eitt skifti.

Frá 1997 til september 2002 var Ida økisleiðari í heimarøktini á Sandoynni. Hon hevur eisini tikið eina tvey ára leiðaraútbúgving innan heilsu- og almannaøkið. Eitt skifti var hon fakligur leiðari fyri heimarøktina.

Síðan 1. juni í ár hevur Ida arbeitt á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, har hon hevur skipað fyri skeiðvirksemi og eftirútbúgvingum.

Ida er úr Havn, foreldrini vóru: Bente, f. Bendix, úr Danmark, og Einar Mikkelsen, el-innleggjari úr Havn. Hon er gift við Finnur Sørensen úr Havn og, tey eiga tvey børn, Beintu og Janus Einar.



**Dagurin**

24. september. Tekla, deyð umleið ár 100. Hevði hoyrt ápostulin Paulus prædika og varð umvend. Hóast hon var illa forfylgd, slapp hon undan hvørja ferð og doyði friðarliga 90 ára gomul.

# Til minnis um
# Karl Martin Smidt Jensen



Hørð og óskiljandi vóru boðini vit fingu sunnumorgunin 31. august, eitt av okkara sytskinabørnum var ikki millum okkum longur, vegna eina ferðsluvanlukku.

Karl Martin var nummar 10 í rekkjuni av okkum 21. Sjálvt um aldursmunurin er umleið 30 ár millum elsta og yngsta systkinabarnið, hava vit altíð øll verið sera góð.

Av tí at Karl Martin var mitt í flokkinum av okkum, er tað eitt sindur ymiskt hvussu vit minnast hann. Tey elstu minnast hann væl sum ein fittan og friðarligan smádrong, hann og Hans Erik sóu út sum tvíburar, altíð so snøggir í líka klæðum. Tey mittastu av okkum minnast hann sum javnaldrandi og ein vinmann og tey minstu minnast hann sum stórabeiggja hjá Pól Jóhannus og eisini onkur av teimum yngstu minnast hann sum gubba sín.

Karl Martin var ein sera fittur, friðarligur og raskur drongur, altíð hevði hann eitt smíl um varrarnar tá ein møtti honum ella var saman við honum. Eisini hevði hann ofta onkra stuttliga viðmerking ella okkurt stuttligt at siga frá.

Saknurin hjá okkum er stórur nú Karl Martin er farin, eitt tómrúm fer altíð at verða eftir hann. Altíð tá familjan fer at verða saman um eitt hvørt, fer hann at mangla. Okkara troyst er tó at vit skula síggja hann aftur ein dag, heima hjá Gudi.

Vit vita at hjá tykkum, Kjartan, Dorit, Hans Erik og Pól Jóhannus, er saknurin størstur. Hjá tykkum, sum hann var saman við hvønn dag, má tað vera óskiljandi at Karl Martin so brádliga varð tikin frá tykkum. Einastu troystarorðini vit kunnu geva tykkum, er at tit aftur ein dag skula møtast heima í himli.

Sálm. 139 ø. 13-18
13. Tí at tú hevur nýru míni gjørt, hevur meg vovið í móðurlívi!
14. Eg tær lovi, tí á undurfullan hátt eg varð skaptur, undurfull verk tíni eru, og sál mín fullvæl tað veit.
15. Bein míni vóru ei fyri tær huld, tá ið eg varð gjørdur í duldum, myndaður í jarðardjúpum.
16. Forløg míni eygu tíni sóu, og í tína bók vórðu skrivaðir allir teir dagar, ið avmáldir vóru, áður enn nakar av teimum var til.
17. Hvør torskilnar eru, Guð, mær hugsanir tínar, hvør miklar tær allar tilsamans!
18. Vil eg tær telja, eru tær fleiri enn sandur, eg man vakna og vera enn hjá tær.

Sangur nr. 51 í Missiónssangbókini

*Ongum er so trygt at fara*
*sum Guds lítla barnaskara,*
*fugli ei í leyvi fjøldum,*
*stjørnu ei í himnatjøldum.*

*Harrin er á Sions fjøllum*
*vernd og skjøldur fólki øllum,*
*vil teim miskunnsamur vera*
*og á faðirørmun bera.*

*Eingin eydna, eingin vandi*
*slíta av skal barnabandið.*
*Hann, sum vinur ber av øðrum,*
*veit um alt í øllum førum.*

*Hann øll hár á høvdi telur,*
*hann hvørt tár úr eyga fjelur,*
*okkum føðir, okkum klæðir,*
*gleðir, um so sorgin bagir.*

*Hvat hann tekur, hvat hann gevur,*
*faðirs hjartalag hann hevur,*
*og hans vilji er hin sami:*
*barnsins sanna gagn og frami*

*Væl tær veri, lítla skara*
*Jakups Gud teg væl skal varða;*
*honum, sum fekk megi alla,*
*fíggindar til jarðar falla.*

*Og tá her er farin dagur,*
*neyð er lokin, tagna klagur,*
*børn øll síni rødd hans kallar*
*heim til gleði ævir allar.*

Friður veri yvir minninum um Karl Martin Smidt Jensen

**Mikala, Anja, Karl Magni, Johild, Kristina, Annika, Joan, Áki, Hallfríð, Kári, Terji, Aron, Kartin, Remi, Cheila, Sóleyg, Siri og Rúni.**